# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– At geva skattalætta í hákonjunkturi og vantandi arbeiðsmegi er sum at leggja eitur fyri búskapin*

*Anders Fogh Rasmussen*

## Ósemja í donsku stjórnini

**Konservativi Fólkaflokkurin vil hava skattalætta á dagsskránna, men Vinstri sigur nei**

Konservativi Fólkaflokkurin hóttir nú við at spreingja donsku stjórnarsamgonguna.

- Kemur skattalætti ikki á borðið, so skatturin lækkar í seinasta lagi næsta ár, fara vit úr stjórnini, sigur skattapolitiski framsøgumaðurin hjá teimum konservativu, Jakob Axel Nielsen, við Berligske Tidende í dag.

Men hann og hini konservativu fáa ikki teirra vilja.

-At geva skattalætta, tá hákonjunkturur er í samfelagnum og trot á arbeiðsmegi, er sum at leggja eitur fyri búskapin, sigur Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, við blaðið.

Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at tað er trýst frá nýggja flokkinum Ny Alliance, sum fær tey konservativu at krevja skattalættan á borðið nú. Ny Alliance hevur lægri skatt sum eitt av sínum fremstu málum, og tað kann fáa konservativar veljarar at skifta flokk, siga eygleiðararnir. Tí noyðist flokkurin at gera okkurt, sum munar.



*Margareth Thatcher, sum nú er 81 ára gomul, hevði stóran áhuga fyri teimum nógvu myndunum á framsýningini*

## Bretar minnast Falklandskríggið

**Ein stór framsýning skal minna bretar á sigurin á argentinum fyri 25 árum síðani.**

649 argentinar og 258 bretar fullu í tí 72 dagar langa krígnum fyri 25 árum síðani millum Bretland og Argentina um ræðið á Falklandsoyggjunum.

Í gjár lat krígssavnið Imperial War Museum í London upp eina framsýning til minnis um kríggið, og hóskandi var tað forsætisráðharrin fyri 25 árum síðani, Margareth Thatcher, sum setti framsýningina.

Framsýningin, sum verður opin teir næstu níggju mánaðarnar, er serliga ognað teimum, sum á ein ella annan hátt høvdu beinleiðis samband við kríggið, fyrst og fremst teimum bretsku hermonnunum.

Kríggið um ræðið á teimum fjarskotnu oyggjunum kostaði bretska ríkiskassanum hálva triðju mia. pund. Argeninar hava ongantíð sagt, hvat tað kostaði teimum at herseta oyggjarnar. Kríggið endaði formliga tann 14. juli í 1982.

## Kvota gevur færri ferðafólk

**Avgerðin hjá norsku myndugleikunum at seta kvotu á, hvussu nógv útlendsk ferðafólk kunnu fiska, hevur fingið stórar avleiðingar.**

Útlendsk ferðafólk kunnu veiða í mesta lagi 15 kilo av fiski, meðan tey halda frí í Noregi. Tað avgjørdu myndugleikarnir í gjør, og tað sæst aftur í bíleggingunum í ár.

-Vit hava 40 prosent færri bíleggingar í ár, tí okkara gestir velja at fara aðrastaðni ístaðin fyri, sigur Torfinn Andreasen, sum skipar fyri veiðiferðum til útlendsk ferðafólk. Hann er ikki tann einasti. Sambært blaðnum Dagens Næringsliv siga allir hinir útbjóðararnir tað sama. Teir, sum hava mist minst, siga seg hava fingið 20 prosent færri bíleggingar enn í fjør.

### STUTT SAGT

### Guð er ikki nevndur

Polska stjórnin hevur kravt, at Guð skal nevnast við navni í teirri komandi grundlógini hjá Evropasamveldinum, og stjórnin hevur fýlst á, at Guð er ikki nevndur í tí uppskotinum, sum fransmenn og niðurlendingar vrakaðu á fólkaatkvøðu í fjør. Týski samveldiskanslarin, Angela Merkel, sum í løtuni er formaður í ES, hevur ongan hug at seta Guð inn í uppskotið. Á einum fundi í Bruxelles í gjár segði hon, at sjálv vil hon fegin hava Guð nevndan í ES-grundlógini, men hon segði seg hava ásannað, at hesum fekst ikki meiriluti fyri.

### Jerry Falwell deyður

Amerikanski sjónvarpsprædikumaðurin Jerry Falwell doyði í gjár, eftir at hann var funnin vitleysur á skrivstovu síni. Jerry Falwell var kendur sum ein av teimum fremstu átrúnaðarligu høgramonnunum, sum hava fingið stóra ávirkan á amerikanskan politikk, síðani George W. Bush gjørdist forseti. Jerry Falwell var serliga kendur fyri sítt harða stríð ímóti samkyndum og fosturtøku, og tað vakti stóran ans, tá hann sett samkynd í samband við yvirgangsatsóknina at USA 11. september í 2001. Seinni bað hann kortini tey samkyndu um umbering fyri tað, sum hann hevði sagt.

### Byggja reaktor

Russisku myndugleikarnir kunngjørdu í gjár, at Russland hevur skrivað undir ein sáttmála um at byggja ein kjarnorkureaktor í Myanmar. Myanmar er fyrrverandi Burma, og umheimurin hevur leingi funnist hvassliga at hernaðarstýrinumstýrinum har, tí tað kúgar ta politisku andstøðuna og virðir ikki vanligar demokratiskar reglur. Russisku myndugleikarnir leggja dent á, at reaktorurin skal ikki brúkast til hernaðarlig endamál, men verður partur av einum granskingarstovni.